## Ráðstevna um Haiti

Í mars verður USA vertur fyri einari altjóða ráðstevnu um Haiti. Á ráðstevnuni, sum verður í New York, fáa heimsins lond høvi til at játta pening til at endurreisa Haiti eftir jarðskjálvtan tann 12. januar. Í gjár var ein fyrireikandi fundur í kanadiska býnum Montreal. Har segði forsætisráðharrin í Haiti, Jean-Max Bellerive, at í fyrsta umfari ræður um at útvega teimum neyðstøddu í Haiti mat, vatn, læknaviðgerð og tak yvir høvdið. Síðani kann heimssdamfelagið leggja ætlanir um at endurreisa samfelagið. Tað arbeiðið fer sambært fleiri at taka eini 10 ár, skrivar Reuters.



## Fogh leggur ætlan

NATO-aðalskrivarin, Anders Fogh Rasmussen, ætlar sær at virka fyri, at innan ársskiftið verður ein ætlan løgd fyri, hvussu og nær afghanski herurin skal yvirtaka uppgávurnar frá teimum útlendsku herdeildunum. Tað segði aðalskrivarin í gjár eftir ein fund við bretska uttanríkisráðharran, David Miliband, sum er vertur fyri Afghanistan-ráðstevnuni, sum verður í London hósdagin. Anders Fogh Rasmussen segði seg vóna, at ráðstevnan verður meiri enn orð, men at nakað veruligt kemur burturúr.

# Vánaligaru dagstovnarnir krógvaðir fyri foreldrum

**Tórshavnar kommuna vil ikki upplýsa foreldrum, hvørjir dagstovnar í kommununi eru ringast umtóktir. – Hetta er ein kanning og ikki ein kapping, sig ur Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóri, hóast nummar eitt, tvey og trý í populariteti eru nevndir við navni**

KANNING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í nýggjari kanning verður upplýst, hvørjir tríggir teir best umtóktu dagstovnarnir í Tórshavnar kommunu eru, men hinir verða duldir.

– Hetta er ein kanning og ikki ein kapping, sigur Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóri hjá Tórshavnar kommunu.

Hann viðgongur tó, at tað kann sýnast óheppið, at tríggir teir best umtóktu stovnarnir eru nevndir við navni, tá ætlanin var, at ongin skuldi nevnast.

– Hetta er ikki ein PISA kanning, har tingini verða roknað og kannað. Hetta er ein subjektiv vurdering, sum foreldur og starvsfólk hava gjørt av ymisku stovnunum, sigur Jóan Petur Hentze, um kanningina av dagstovnum, sum fyritøkan Lóður hevur gjørt fyri Tórshavnar kommunu.

### Kann broyta val

Í Århus kommunu, ið hevur gjørt júst somu kanning, sum Tórshavnar kommuna hevur gjørt, verða tílík skoðsmál av stovnum almannakunngjørd, og foreldur nýta millum annað hesar upplýsingar, tá tey velja ein dagstovn.

- Almannakunngeringin av trimum teimum bestu stovnunum kann hava við sær, at foreldur velja hesar tríggjar stovnarnar framum hinar, tá tey skulu velja, viðgongur trivnaðarstjórin.

Tá hann verður spurdur, um hetta leggur allar hinar stovnarnar undir illgruna at vera ringastir, svarar hann við tøgn.

Fleiri viðmerkingar vil Jóan Petur Hentze ikki gera til málið í verandi løtu, men staðfestir, at innlitsumbøn frá Sosialinum í nøvn og úrslit á stovnunum – sum ikki eru nevndir við navni – í løtuni verður viðgjørd av kommununi.




*Hóast tríggir teir best umtóktu dagstovnarnir í Tórshavnar kommunu eru nevndir við navni, so vil kommunan ikki siga hvørjir hinir eru. Orsøkina sigur kommunan vera, at talan er um eina kanning og ikki eina kapping*

# Ternuryggur best umtóktur



*Býlingshúsið á Ternuryggi fær best skoðsmál í kanning, sum Lóður hevur gjørt fyri Tórshavnar kommunu. Marjun Hentze, leiðari, fegnast um stóra nøgdsemið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Marjun Hentze, leiðari á býlingshúsinum á Ternuryggi, sum gjørdist mest umtókt í nøgdsemiskanningini hjá Tórshavnar kommunu, sær úrslitið hjá stovninum sum eina stóra viðurkenning. – Tað er ein góð kensla, sigur hon**

KANNING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Av teimum 29 dagstovnunum í Tórshavnar kommunu sum nøgdsemiskanning er gjørd á, verða tríggir teir best umtóktu nevndir við navni.

Fremst er býlingshúsið á Ternuryggi. Hesum stovninum á baki koma Dagstovnurin á Hamrinum og Dagstovnurin Lítliskógur.

– Tað er ein góð kensla. Ein góð viðurkenning frá foreldrunum, sigur Marjun Hentze, leiðari á Býlingshúsinum á Ternuryggi, sum sambært foreldrunum er best úmtókti dagstovnur í Tórshavnar kommunu.

– Hví júst okkara stovnur er tann besti, er ringt at siga.

– Tað er tað góða arbeiði, ið verður gjørt her á stovninum, ið verður nøkta nøgdsemis tørvin hjá júst okkara foreldrum, leggur hon afturat.

Marjun Hentze greiðir somuleiðis frá, at tey fara at halda fast við góða støðið, og at tað eisini fer at merkjast, at tingini alla tíð mugu betrast.

– Í kanningini siga teir, at krøvini fara at blíva hægri, og tað veit eg eisini. Tí mugu vit alla tíðina royna at gerast betri, sigur leiðarin á stovninum við best nøgdum foreldrum.

### Gott at dylja úrslitið

Hóast stovnurin, har Marjun Hentze er leiðari, er fremst, so heldur hon tað vera gott, at ikki allir stovnarnir, ið hava verið við í kanningini, verða nevndir við navni.

– Tað var ikki meiningin við hesari kanning, sum er tann fyrsta av sínum slag í Tórshavnar kommunu, og tað hevði givið eitt sera keðiligt útslag. Og eg veit ikki, um eg haldi tað vera gott at okkara úrslit er alment, men tað er farið út, og tað kann mann ikki gera umaftur, heldur Marjun Hentze, sum fegnast um at henda kanning er gjørd og sær fram til at nýggj kanning verður í 2011.